# Hetta øsir fólk upp

**- Tað er óskiljandi, at politikarar geva sær sjálvum eina stóra eftirløn, men lata vanliga fólki sita eftir, heldur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag**

EFTIRLØN TIL LANDSSTÝRISMENN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Tað, sum er hent nú, er ikki nakað, sum vanlig fólk skilja, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

Tað er fallið Hans Joensen, formanni í Havnar arbeiðsmannafelag, fyri bróstið, at politikararnir nú hava samtykt eina munandi hækking í eftirlønunum hjá landsstýrismonnum.

Hann sigur, at tað øsir fólk upp, tí tað undarligt, at politikarar samtykkja at hækka sína egnu eftirløn og at teir gera tað við afturvirkandi kraft.

– Heilt nógv fólk hava ringt til mín sum formann í Havnar Arbeiðsmannafelag og hava átalað politikararnar fyri hetta, teir hava gjørt.

Hans Joensen leggur dent á, at øll, eisini landsstýrismenn, skulu sjálvandi hava eina hampiliga eftirløn.

– Men tað virkar so ógvusligt at lóggeva sær sjálvum eina góða eftirløn, samstundis sum eftirlønin hjá øllum øðrum liggur á láni so tað munar.

Sjálvur heldur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, at tað einasta rætta er at styrkja samhaldsfasta eftirlønargrunnin, so at hann verður førir fyri at veita øllum eina hampiliga pensjón, eisini landsstýrismonnum og eisini so, at mannamunur ikki verður gjørdur, men at øll fáa líka.

Hann heldur eisini, at tey, sum forvinna nógv í arbeiðslívinum, hava eisini møguleika at leggja nakað til síðis til síni egnu eftirlønarár, men tað hava vanlig verkafólk ikki.

– Tað, sum nú er hent, er ein provokatión og slíkt kemur oftani afturum aftur, tá ið sáttmálasamráðingar vera, tí tá minnast fólk, at politikararnir hava sett sína egnu løn og sína egnu eftirløn munandi upp.

Hann vil ikki siga, at hetta fer at ávirka samráðingarnar, men slíkt sum hetta mugu fakfelagsfólk ofta hoyra fyri, tá ið samráðingar eru og tað ger tað avgjørt ikki lættari.

Hans Joensen heldur serliga lítið um, at eftirlønan hjá landsstýrismonnum skal roknast frá 1998 og sostatt við afturvirkandi kraft.

– Tað er væl keyp og søla, har onkur politikari, sum kanska annars ikki hevði komið uppí, atkvøðir fyri, so at viðkomandi sjálvur sleppur upp í og fáa eina góða eftirløn.

Hann setir tó ongi nøvn á, men hann heldur, at tað er væl eisini ein spurningur um, hvussu gegnigir politikarar eru at viðgera sína egnu eftirløn.

# Umhvørvisdagar í høvuðsstaðnum

**Í døgunum frá 15. - 21. mai verður umhvørvisvika í Havnini. Nógv upplýsandi tiltøk verða, og tað verður eisini skipað fyri ruddingardøgum**

Tórshavnar býráð skipar í døgunum frá 15. - 21. mai fyri einari umhvørvisviku. Tiltakið er ein liður í, at fáa Havnina til at verða ein reinari og umhvørvisvinarligan bý. Tað verður skipað fyri ruddingardøgum, har ið skúlar, ítróttarfeløg, skótar og onnur fara at luttaka. Øll eru vælkomin at hjálpa til at rudda.

Miðbýurin verður miðdepilin um umhvørvisvikuna. Har verður ein umhvørvismarknaður, har ymiskir básar verða. Millum annað verða smakkiroyndir av vistfrøðiligum matvørum, SEV fer at greiða frá orkusparandi tiltøkum, og okkurt verður fyri børnini eisini. Gongugøtan verður stongd fyri ferðslu alla vikuna.

Plantupakkar verða útflýggjaðir eins og undanfarin ár. Sunnudagin 21. mai verður skipað fyri umhvørvisgongutúrum. Ein serligur gongutúrur verður fyri tey rørslutarnaðu út á vatnverkið.

### Ókeypis busskoyring

Alla vikuna verður ókeypis at koyra við býbussunum. Hetta er ein liður í at fáa fólk til at nýta kollektivu ferðsluna meira. – Fyrimunirnir við at fólk fara at nýta bussin meira, er at tað fer at loysa parkeringstrupulleikarnar í miðbýnum. Tað fer eisini at minka munandi um dálkingina og harafturat verður minni nýtsla av brennievni, sum er dýrkað sera nógv, og helst fer prísurin enn longur upp, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

Vit fara at kanna, um tað ger nakran mun at hava ókeypis busskoyring, og um undirtøkan verður góð, fara vit at arbeiða víðari við at betra um busskoyringina, sigur Elin Lindenskov.

Á umhvørvisvikuni verður serligur dentur lagdur á at fáa eina hugburðsbroyting millum fólk. – Vit ynskja ikki, at fólk einans skulu rudda hesa vikuna og síðani fara aftur at kasta rusk í náttúruna. Tað má gerast eitt hjartamál hjá okkum øllum, at vit vara um náttúruna. Náttúran skal verða í hásæti, og vit ynskja at geva ein reinan og vakran bý víðari til okkara børn og abbabørn, sigur Heðin Mortensen.

Vissiónin hjá býráðnum er, at allar vágir og áir skulu verða reinar. Vit ætla at gera íløgur fyri 100 milliónir tilsamans. - Tá skal tað verða gjørligt at svimja millum bátarnar í Vágsbotni, sigur Elin Lindenskov við einum smíli.

Skráin fyri umhvørvisvikuni kann síggjast á www.torshavn.fo

Føroya Ríðingarfelag

**Ríðiskeið**

Í døgunum 17. til 20. mai 2006, verður ríðiskeið fyri børnum/ungum (aldursmark 8 ár).

Neyðugt er at hava ross við sjálvi!

Kostnaður: Limir kr. 300,- ikki limir kr. 400,-

Tilmelding á tlf. 223333, 261459 ella t-post nbrockie@post.olivant.fo áðrenn 16. mai 2006.

**Føroya Ríðingarfelag**

**STUTT SAGT**

## Heimsins bestu síl

**Umstøðurnar at ala og góðskugóða fóðurið hjá Havsbrún fáa æruna fyri, at føroysku sílini eru heimsins bestu, heldur japanski forstjórin í SNG, Kioshy Kajikawa**

FISKIVINNUMESSA
*Jákup Mørk*

SNG, sum stendur fyri Shin Nihon Global, skal í ár flyta úr Føroyum til Japan 3.000 tons av ælabogasílum, ið verða ald á Kaldbaksfirði, Oyndarfirði og í Øravík. Tá Kioshy Kajikawa verður spurdur, um SNG fær selt øll sílini á japanska marknaðinum, ivast hann ikki eina løtu.

– Føroysk síl eru tey bestu í heiminum. Tey eru nógv betri enn t. d. norsk og kilensk síl. Hetta kemst av tveimum orsøkum. Onnur er, at fóðurið frá Havsbrún er fyrsta floks. Hin er, at Føroyar eru eitt sera væl egnað pláss at ala fisk, tí tær liggja á opnum havi, sigur Kioshy Kajikawa við heimasíðuna hjá Føroya Banka.

Hann vísir á, at fóðurið, sum aldur fiskur fær, hevur avgerandi ávirkan á, hvussu góðskan á fiskinum verður. Góðskan á fiskinum hevur so aftur avgerandi ávirkan á, um nakar tímir at keypa hann.

– Vit selja síl til japanarar, sum eta tey rá. Ein japanari smakkar og luktar beinanvegin, um fiskur hevur fingið gott ella vánaligt fóður. Fóður, sum er sett saman av fleiri djórasløgum og nógvum soyabønum, gevur fiskinum ringan lukt og kann gera hann sjúkan. Tá fiskur verður sjúkur, má hann hava heilivág, og so fer góðskan heilt í botn. Hesar trupulleikar hava vit als ikki av føroyskum sílum. Tey eru tey bestu á heimsmarknaðinum," sigur Kioshy Kajikawa.

Kajikawa heldur, at føroyingar eru bæði stavnin og skutin framman fyri eitt nú kilenar, tá tað snýr seg um umstøður at ala síl.

– Kilensk síl verða ald langt inni í landinum, har umhvørvið meira enn so kann vera dálkað. Í Føroyum verða tey ald mitt í einum reinum umhvørvi, sum orsakað av skiftandi veðurlagnum eisini syrgir fyri, at útskiftingini í sjónum er stór, sigur japanski forstjórin í SNG.

*Kelda: www.foroyabanki.fo*